**Jørgen Niclasen**
**landsstýrismaður**

**Svar upp á fyrispurning nr. 107/2014 eftir § 52a í tingskipanini frá Janusi Rein, løgtingsmanni, um striking av goldnum avgjaldi á kosmetikvørum o.a.**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

Hevur landsstýrismaðurin ætlanir um at broyta løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um avgjald á framleiðslu og innflutningi (Striking av avgjaldi á kosmetik o.a.), Ll. nr. 43/2015 soleiðis, at handlar, sum hava kosmetikvørur á goymslu pr. 1. juli 2015, eftir umsókn kunnu fáa goldið avgjald afturgoldið, so sølan ikki verður kappingaravlagandi?

**Svar**

Tá eg gjørdi lógaruppskotið, umhugsaði eg eisini henda spurning. Eg var greiður yvir, at man áður í summum førum hevði givið endurgjald fyri avgjald á vørum, ið lógu á goymslu, tá ið lógin kom í gildi.

Skuldi tílíkt endurgjald gevast, var neyðugt, at goymslur vóru taldar upp dagin, tá ið lógarbroytingin kom í gildi, og at løggildur grannskoðari skuldi vátta rættleikan í uppgerðini. Síðan skuldi meting gerast um, hvat endurgjaldið fór at kosta landskassanum, og fígging skuldi finnast á fíggjarlógini.

Mín meting var, at valdi eg hesa loysn, ið kravdi serliga fígging á fíggjarlógini, var trupult at fáa politiska undirtøku fyri uppskotinum. Eg valdi tí heldur í góðari tíð at fara út alment við mínum ætlaðum og lata hóskandi tíð ganga til gildiskomuna av lógaruppskotinum, soleiðis at fyritøkur høvdu møguleika at tillaga teirra goymslur. Lógaruppskotið er dagfest 26. februar í ár. Tað var samtykt av Løgtinginum 24. apríl og kemur í gildi í morgin 1. juli. Fyritøkur hava tí havt tíð at tillaga sínar goymslur.

Eisini kann nevnast**,** at Handilsfelagið í hoyringsskrivi, dagfest 24. februar 2105, skrivar soleiðis: *“ Felagið tekur fult undir við broytingini og hevur ongar viðmerkingar til lógaruppskotið. Vinnan hevur leingi víst á, at hesi gjøld áttu at verið avtikin. Felagið fegnast um, at stig nú eru tikin til at ganga ynskjunum hjá handilsvinnuni á møti.”*

Sum kunnugt kemur lógarbroytingin í gildi 1. juli, og ikki ber til afturvirkandi at gera eina lógarbroyting, sum spurt verður um. Eg haldi, vit bara skulu fegnast um, at tað hevur eydnast okkum, at tikið av hetta avgjald, ið hevur givið útlendskari vinnu fyrimun í mun til føroyska vinnu.

Fíggjarmálaráðið, 30. juni 2015

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður